# Tilboð um endurvenjing innan sjúkrahúsverk, almannaverk og kommunur



HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Health and the Innterior

ALMANNAMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Social Affairs

Kommunufelagið

# Innihaldsyvirlit

Tilboð um endurvenjing á Landssjúkrahúsinum .................................... 3

Tilboð um endurvenjing á Klaksvíkar sjúkrahúsi .................................. 7

Tilboð um endurvenjing á Suðuroyar sjúkrahúsi .................................... 9

Tilboð um endurvenjing innan Almannaverkið.................................. 13

Tilboð um endurvenjing hjá kommununum....................................... 14

# Tilboð um endurvenjing á Landssjúkrahúsinum

Sjúkrahúslækni, umframt kommunulækni, kann vísa til endurvenjing á Ergo- og Fysioterapideildini á Landssjúkrahúsinum.

Meðan sjúklingur er innlagdur, kann hann fáa endurvenjing, um lækni ordinerar/skipar fyri hesum. Endurvenjing kann vera til hesar sjúklingar:

*Fysioterapi:*
Mobilisering og lungnaterapi: aftaná skurðviðgerð, seingjalegu, sjúku, t.d. apopleksi, hjarta-, lungna-, krabbameins-, KOL-, palliativir-, trot-, nýra-, sukursjúkusjúklingar og aðrir neurologiskir og geriatriskir sjúklingar (gomul við fleiri sjúkum) o.a.

*Ergoterapi:*
Innlagdir sjúklingar, sum hava apopleksi, kunnu fáa ergoterapi. Innlagdir sjúklingar kunnu eisini ávísast til psykiatriska ergoterapi.

Mett verður um, um sjúklingur hevur tørv á hjálpartólum, og verður sjúklingurin stuðlaður í at søkja um tey.

**Ambulant endurvenjing frá fysioterapeuti, verður veitt hesum sjúklingum:**

- Sjúklingur, sum er skurðviðgjørdur og hevur fingið nýggja mjødn, hevur møguleika fyri at venja á einum liði í fýra vikur, tilsamans 8 ferðir.

- Sjúklingur, sum er skurðviðgjørdur og hevur fingið nýtt knæ, hevur møguleika fyri at venja á einum liði í fýra vikur, tilsamans 8 ferðir.

- Sjúklingur, sum er skurðviðgjørdur í rygginum, hevur møguleika fyri at fáa vegleiðing og venja tilsamans 6-8 ferðir.

- Sjúklingur, sum hevur verið á skurð ambulatoriið og fingið ávísing frá lækna, t.d aftaná beinbrot ella skurðviðgerð av økslini, kann fáa endurvenjing eftir tørvi.

- Sjúklingur, sum er skurðviðgjørdur og hevur fingið nýtt krossband, hevur møguleika fyri at venja í 8 vikur.

Tilboð um endurvenjing innan sjúkrahúsverk, almannaverk og kommunur

- Sjúklingur, sum er skurðviðgjørdur fyri bróstkrabba, hevur møguleika fyri vegleiðing og endurvenjing 3-5 ferðir í einum tíðarskeiði uppá 3 mánaðar.

- Barnakona, sum hevur pínu í kokuni (kokuloysn), hevur møguleika fyri at koma til eina meting og vegleiðing eina ferð.

- Sjúklingur, sum er inkontinent/ur, hevur trupult við at halda uppá landi og/ella skarni, hevur møguleika fyri at fáa endurvenjing í bólki ella sum einstaklingur
  - Inkontinens fyri landi og/ella skarni, 1 til 5 ferðir individuelt, og í bólki 4 ferðir
  - Radikal prostataectomi, 1 til 3 ferðir
  - Sphincter rupturar, 1 til 5 ferðir

- Sjúklingar, ið hava havt blóðpropp í hjartanum (AMI sjúklingar), kunnu fáa tilboð um endurvenjing í bólki/liði. Liðið venur 2 ferðir um vikuna í 12 vikur.

- Sjúklingar við hjartasvíkjan venja á liði 2 ferðir um vikuna í 12 vikur og síðani fylgd til viku 24. Liðini til hjartavenjingar verða skipaði alt árið eftir tørvi við leypandi upptøku.

- Sjúklingur, sum hevur KOL og aðrar lungnasjúkur, kann fáa endurvenjing á einum liði. Lið verða skipað tvær ferðir um árið. Liðið venur 2 ferðir um vikuna í 7 vikur tilsamans. Liðini eru ætlað sjúklingum í fasu 3 og 4, ið hava minni enn 50 % av væntaðum lungnakapaciteti.

Sjúklingur, sum hevur lymfødem, (primer lymfødem, sekunder lymfødem, lippødem, pleboødem, plebo/lymfødem) hevur møguleika fyri at koma til endurvenjing/lymfødem viðgerð eina til tvær ferðir um árið.

- Sjúklingar, sum eru knýttir at Psykiatriska deplinum, kunnu fáa endurvenjing.

Børn, sum hava verið innløgd, kunnu fáa endurvenjing.
Børn, sum hava verið knýtt at barnadeild, kunnu fáa fysioterapi.

- Sjúklingur, sum hevur fingið apopleksi, kann fáa endurvenjing.

## Ambulant endurvenjing frá ergoterapeuti verður veitt hesum sjúklingum:

Hesir sjúklingabólkar fáa tilboð um ambulanta ergoterapi:

- Sjúklingur, sum er skurðviðgjørdur ella hevur fingið skaða í hondina, hevur møguleika fyri at fáa endurvenjing/vegleiðing frá ergoterapeuti.
- Sjúklingur, sum hevur fingið apopleksi, kann fáa endurvenjing.
- Sjúklingur, sum hevur verið innlagdur á sjúkrahúsi, t.d í Danmark, og fingið ergoterapi har, hevur møguleiki fyri at halda áfram við ergoterapi á Landssjúkrahúsinum.
- Sjúklingar, ið av sálarligum ávum hava trupult við at gera vanligar dagligar uppgávur, kunnu ávísast til psykiatriska ergoterapi.
- Sjúklingar, ið hava trupult við svøvni, at konsentrera seg, hava óró í kroppinum og ótta, kunnu ávísast til psykiatriska ergoterapi.

# Tilboð um endurvenjing á Klaksvíkar sjúkrahúsi

Sjúkrahúslækni umframt kommunulækni kann vísa til endurvenjing á Fysiurgisku deild (fysio- og ergoterapi) á Klaksvíkar sjúkrahúsi. Meðan sjúklingur er innlagdur, kann hann fáa endurvenjing, um læknin ordinerar/skipar fyri hesum.
Mett verður um, um sjúklingur hevur tørv á hjálpartólum, og verður sjúklingurin stuðlaður í at søkja um tey.

Sjúklingar kunnu verða innlagdir til endurvenjing á Klaksvíkar sjúkrahúsi. Teir sjúklingabólkar sum kunnu fáa hetta tilboð eru:

- Sjúklingar, sum eru innlagdir til planlagda skurðviðgerð, t.d skift mjødn og knæ, vegna ryggskurð, beinbrot, hond ella fót v.m. fáa eftirfylgjandi endurvenjing.

- Apopleksisjúklingar, sum hava verið innlagdir á Landssjúkrahúsinum og sum hava vant fyrstu tíðina á Landssjúkrahúsinum, kunnu fáa framhaldandi endurvenjing á Klaksvíkar sjúkrahúsi. Møguleiki er fyri at tríggir sjúklingar eru til endurvenjing í senn.

- Apopleksisjúklingar, sum hava verið innlagdir á sjúkrahúsi uttanlands, kunnu fáa framhaldandi endurvenjing á Klaksvíkar sjúkrahúsi. Møguleiki er fyri, at tríggir sjúklingar eru til endurvenjing í senn.

- Neurologiskir sjúklingar kunnu verða innlagdir til intensiva endurvenjing í eitt avmarkað tíðarskeið.

**Ambulant endurvenjing verður veitt hesum sjúklingum:**

Sjúklingar, sum hava verið undir skurð, og sum hava fingið eginendurvenjingarætlan, og sum tó hava tørv á endurvenjing, kunnu fáa endurvenjing í eitt avmarkað tíðarskeið.

Apopleksisjúklingar og neurologiskir sjúklingar annars hava møguleika fyri framhaldandi ambulantari endurvenjing í eitt avmarkað tíðarskeið.

Medisinskir sjúklingar við diabetes, KOL og hjartasjúkum kunnu venja á einum liði. Liðini verða skipað, tá tørvur er á tí.

Giktasjúklingar kunnu fáa endurvenjing í heittvatnshyli. Sjúklingar venja í bólki, umleið 6 fólk í senn. Serlækni og kommunulækni kunnu vísa til heittvatnshyl.

Lymfødemviðgerð verður veitt á Klaksvíkar sjúkrahúsi. Serlækni og kommunulækni kunnu ávísa til hetta.

Hitaviðgerð, so sum paraffinbað og heitur sandur.

Ergoterapi: Sjúklingur, sum er skurðviðgjørdur ella hevur fingið skaða í hond/arm, hevur møguleika fyri at fáa endurvenjing/vegleiðing frá ergoterapeuti.

Sjúklingur, sum hevur apopleksi, kann fáa endurvenjing.

Sjúklingur, sum hevur verið innlagdur á sjúkrahúsi, t.d. í Danmark, og fingið ergoterapi har, hevur møguleika fyri at halda áfram við ergoterapi á Klaksvíkar sjúkrahúsi.

# Tilboð um endurvenjing á Suðuroyar sjúkrahúsi

Sjúkrahúslækni kann vísa til endurvenjing á Ergo-og Fysioterapideildini á Suðuroyar sjúkrahúsi. Meðan sjúklingar eru innlagdir, kunnu teir fáa endurvenjing, um lækni ordinerar/skipar fyri hesum. Mett verður um, um sjúklingurin hevur tørv á hjálpartólum, og verður sjúklingurin stuðlaður í at søkja um tey.

Sjúklingar, ið fáa endurvenjing á Suðuroyar sjúkrahúsi, eru:

- Sjúklingur, ið verður innlagdur vegna sjúku, ið eftirfylgjandi fær endurvenjing eftir ordinatión frá sjúkrahúslækna og í samráð við ein terapeut.

- Hetta fevnir um alt frá lungaterapi, serliga KOL, til almenna mobilisering til skurðsjúklingar, herundir knæ og mjadna-alloplastik spinalstenosu, discusprolaps, frakturar herundir akslar o.s.fr

- Heimavitjanir og at søkja um hjálpitól.

- Sjúklingur, ið hevur kroniska sjúku, kann verða innlagdur via sín egna kommunulækna til endurvenjing í umleið 4 vikur.

- Øll innløgd fáa fysioterapi/ergoterapi 2 ferðir dagliga.

- **Ambulant endurvenjing**

Kommunulækni ávísir til ambulanta endurvenjing,
sum er í eitt avmarkað tíðarskeið.

**Ambulant endurvenjing frá fysioterapeuti,
verður veitt hesum sjúklingum:**

- Børn við atferðartrupulleikum ella motoriskum avbjóðingum. Børnini verða øll kannaði annaðhvørt SI-testa, Sensory profile, MAP-test ella annað relevant.

- Parkinson hold venjing 2 ferðir um vikuna í 8 vikur. Hetta verður bjóðað 3 ferðir um árið.

- Adipositas hold ella diabetes í samráð við kommunulækna og kostráðgeva, venjing 2-3 ferðir um vikuna í 12 vikur, uppfylgjan og síðan ein víðari ætlan.

- KOL venjing 2 ferðir um vikuna í 8 vikur. Holdini verða skipaði tá tørvur er á hesum.

- Barnakonur. Byrjar í viku 24. Hetta er undan føðing. Eftirføðingar hold byrjar í viku 8, venja í 8 vikur.

- Medisinskir sjúklingar við lívsstílsjúkum.

- Skurðsjúklingar, knæ og mjadna alloplastikkir, endurvenjing eftir frakturar eitt nú akslar, albogar, hendur v.m spinalstenosur, discusprolaps o.a

- Reumatologiskir sjúklingar: primært heiti hylurin, ergonomi, styrki og mobilsering, paraffin, vegleiðing í hjálpitólum.

- Kroniskar sjúkur harvið ofta bassinvenjing/viðgerð.

## Tilboð um endurvenjing innan sjúkrahúsverk, almannaverk og kommunur

- Neurologiskir sjúklingar herundir
  apolpexia cerebri, sclerosa, parkinson etc.

- Geriatriskir sjúklingar.

- Flytingar og undirvísing.

- Bassinvenjing.

- Knæhold 2 ferðir um vikuna í 8 vikur.

- Rygghold 2 ferðir um vikuna í 8 vikur.

- Akslahold 2 ferðir um vikuna í 8 vikur.

- Akupunktur.

- El-terapi.

- Heimavitjanir eftir tørvi. Hetta er serliga í mun til tey, ið eru innløgd.

**Ambulant endurvenjing frá ergoterapeuti,
verður veitt hesum sjúklingum:**

- Børn við atferðartrupulleikum ella motoriskum avbjóðingum. Børnini verða øll kannaði annaðhvørt SI-testa, Sensory profile, Map-test ella annað relevant.

- Reumatologiskar sjúklingar. Venjing/viðgerð, vegleiðing, kunning.

- Neurologiskir sjúklingar herundir vanliga apolpexia cerebri, parkinson, sclerosa o.sfr.
- F.O.T.T.

- ADL venjingar.

- Kognitiv venjing til børn og vaksin.

- Munnstimulering til børn og vaksin.

- Frakturar herundir serliga aksla- albogar og hond –problematikkir.

- CTS.

- Arrviðgerð.

- Sansamotoriskar og sansaintergratiónsvenjingar til børn og vaksin.

- Heimavitjunartænastu í mun til hjálpitól, taka støðu til íbúðarbroytingar og atkomuviðurskifti.

- Venjing í heiminum hjá sjúklinginum herundir ADL venjing.

# Tilboð um endurvenjing innan Almannaverkið

Endurvenjingin í almannaverkinum er lógarfest í § 29 í forsorgarlógini: Almannaverkið veitir endurvenjing til persónar í aldrinum 18-66 ár, sum hava tørv á endurvenjing í sambandi við mistan førleika. Í serligum førum kann endurvenjing veitast til persónar, sum eru 16-17 ár. Endamálið er, at borgarar fáa neyðuga endurvenjing.

1) fyri at fáa ella fasthalda tilknýtið til arbeiðsmarknaðin ella
2) fyri at klára seg uttan hjálp ella við minni hjálp frá almannaverkinum.

Borgarin skal vera í aldrinum 18-66 ár og hava verið úti fyri tilburði, sum hevur broytt førleikastøðið og lívsumstøðurnar munandi. Endurvenjingin er málrættað og verður einans játtað í eitt avmarkað og frammanundan avtalað tíðarskeið.

Endurvenjingin skal hjálpa borgarum út aftur á arbeiðsmarknaðin og/ella at gerast meiri sjálvstøðug og virkin í heima- og frítíðarlívi. Endamálið er, at borgarin, við endurvenjingini, heilt ella partvíst endurvinnur sama førleika aftur, sum viðkomandi hevði, áðrenn hann misti førleikan.

**Endurvenjingar deplar eru í Tórshavn og í Runavík.**

Um borgari ynskir endurvenjing, verður søkt um tað hjá Almannaverkinum. Umsóknarblaðið um endurvenjing er at finna undir oyðubløð á heimasíðuni hjá Almannaverkinum **www.av.fo**

# Tilboð um endurvenjing hjá kommununum

Endurvenjing hjá kommununum er lógarfest í lógini um heimatænastu § 10. Kommunur í hesum samanhangi er Tórshavnar kommuna og 7 kommunal samstørv.

Kommunurnar veita heimabúgvandi fólkapensjónistum, t.v.s. borgarum eldri enn 67 ár, tænastur, ið kunnu stimbra likamliga, sálarliga og sosialt, soleiðis at pensjónisturin kann búgva í egnum heimi sum longst.

Tænasturnar kunnu fevna um:

Dagtilhald, ergoterapi, fysioterapi, endurvenjing, fyribyrgjandi venjing, viðlíkahaldsvenjing, dagtilboð, mattænastu, umlætting, koyritænastu, vegleiðing o.s.fr.

Endurvenjing er eitt miðvíst og tíðaravmarkað samstarv millum eldri borgarar, avvarðandi og heilsustarvsfólkini. Málið við at endurvenja eldri borgarar er, at borgarin í so stóran mun sum gjørligt verður førur fyri at gera tað, ið hann var førur fyri, áðrenn hann misti førleikan.

Førleikin at røra seg, at vera virkin, at fata, at kenna og at virka saman við øðrum, verður mentur. Málið og innihaldið í venjingini verða ásett fyri hvønn einstakan í samstarvi millum partarnar.

Tænasturnar eru skipaðar ymiskt í kommununum, og kunnu borgarar fáa meira at vita um tænasturnar, við at seta seg í samband við avvarðandi kommunu, og ella við at leita á heimasíðuni hjá kommununi.

Borgari, kommunulækni, avvarðandi, visitator og heilsustarvsfólk, kunnu venda sær til heimarøktina í kommununi, við ynski um endurvenjing. Mannagongdin fyri at fáa endurvenjing er skipað ymiskt frá kommunu til kommunu.

PRENT: FØROYAPRENT